# Kjak



**Kári á Rógvi**
*løgtingsmaður og formaður Sjálvstýrisfloksins*

## Tá verður tær størri skaði

*Annita á Fríðriksmørk og Bill Justinussen staðfestu tíverri í aftursvarum sínum, at málið halgar miðilin hjá teimum. Tey hava nú endurnýggjað legenduna*

Bill Justinussen var so herliga ókompliseraður í svari sínum: hann vil fegin flyta nøkur frá figgjarlógarpromillu av hesi góðu ætlan (t.d. bústaðum fyri minniment) á hasa góðu ætlan (t.d. avvenjing). Skal bert taka undir við landsnevndarformanni okkara um virðið í slíkum smáflytingum uttan semju ið røkkur fram í tíð – og so harmast um, at Bill tók stig til brúka neyðstøðuásetingina um frávik í átrokandi málum at taka rættin til umrøðu frá Føroya fólki og minnilutanum á tingi.

Hetta seinna var poengið hjá mær: vit kunnu illa tosa um heimsins elsta fólkaræði og skriva stjórnarskipan við minnilutarættindum, tá ið høvuðsreglan er vorðin, at allar reglur um viðgerðarstig og viðgerðartíð verða settar til viks. Kritikkurin hjá mær var ikki minst vendur ímóti formansskapi okkara, men serliga móti Bill og teimum, sum ikki vildu lata dagslýsi koma framat teimum fíggjarlógarbroytingum ið hann annars rósar sær av.

### Lítið hevur tú góðsið fingið

Annita á Fríðriksmørk hevur tvey argument í svari sínum: fyrst, at hon sum móðir Grettis kann siga um meg, at ungdómur og vísdómur fylgjast sjálvdan at; síðani, at eg skal vera ímóti at lata Fróðskaparsetrinum eina millión eyka.

Nú eru sjálvandi fá so mettaði av kunskapartræsins fruktum sum Annita, men lat meg kortini minna Annitu á orðini hjá móðir Grettis beint eftir staðfestingina um vitsku hansara:

*Lítið hevur tú góðsið fingið*
*av tínum faðirs ræði;*
*fært tú ikki meiri frá mær,*
*tá verður tær størri skaði.*

Vandamálið hjá Annitu er, at hon ikki hevur vísdómin hjá Grettismóðir, men heldur ger skaðan verri, sum landsstýrið og samgongan longu hava gjørt, bæði tá ið ræður um fólkaræðisliga framferð, men sanniliga eisini fíggjarliga raðfesting.

Vit brúka alt ov lítið til útbúgving í Føroyum. Vit skulu fleirfalda framleiðsluna hjá Fróðskaparsetrinum og øðrum skúlun eftir miðnám, vit mugu semjast um at tryggja øllum lestrarsøkjandi lestrarpláss, og serliga mugu vit hava semju um fíggjarkarmin hjá Fróðskaparsetrinum fleiri ár fram í tíðina.

Men Annita á Fríðriksmørk hevur gingið við til at gera føroyskan politikk til tjúkkan havragreyt: ongin veit, hvat er hvat, ongin munur er, onki val millum landsstýrisins lágu raðfestingar av útbúgving og møguliga høgu raðfestingar andstøðurnar; bara greytur. Á jólum 2008, tá Annita ætlaði sær at gerast eysturoyarumboð, tók hon við samseku sínum 5 milliónir av setursjáttanini – og breiðkaði vegir. Nú hevur hon møguliga funnið tað eina aftur. Men hetta er líkamikið; fáa vit ikki semju í lag um at vaksa um Setrið, so verður sum hjá bátsmonnum Grettis. "so bjóða vit ikki bøtur!"



**Dagfinnur Danbjørg**

## CDEH - ein nýggj og betri kós fyri Føroyar

Høgrarákið í sambandsmjørkanum má fáa ein enda. Várvónin við nýggjari kós má setast. Og kósskiftið móti einum sjálvbjargnum Føroyum við frælsi og javnrættindum megnar bert CDEH - saman við einum aktivum og málrættaðum veljaraskara - at fremja, um teirra veljarar ikki einans seta kross við CDEH á valdegnum, men virka fyri settu skránni, ið helst skal tilevnast og tilpassast flokanna millum longu frá nú av og til valið og síðani tillagast tíðini og útfordringunum, so langt eygað sær. Hetta krevur samanhald, sjálvt um ikki øll fáa alt, men at hvør flokkur fær mest møguligt undir teim givnu umstøðunum. Og tað krevur sjálvdisciplin, so skútan kann halda løgdu kósini - hóast brotasjógvar og illveður. Tí leystgangandi missilir eiga ikki at vera toldir. Teir kunnu við egináhugamálum søkka skútuna, og tað hava vit ikki ráð til.

Men støða - frá í dag av og fram til valið -má í samstarvi millum umboð fyri CDEH takast til mál mið og kós við atliti til m.a.:

Nýggjar vinnur. - Nýggja orku. - Tilfeingi. - Útbúgvingar heima og úti. - Skattalógina. - Almannamál. - Heilsumál. - Útoyggjamál. - Mentan. - Ríkislóg við kós móti sjálvbjargni. - Fólkaatkvøðu fyri 2020. - Soleiðis at veljararnir kunnu fáa at vita, hvar kósin verður sett við CDEH við róðrið. Men sjálvandi kunnu teir einstaku flokkarnir eisini agitera við teirra serstøku málum. Í etiskum málum er annars hvør tingmaður frítt stillaður.

Sjálvt um nevndi samgongumøguleiki er nógv hin sterkasti - kanska ikki í mandatum, - men so avgjørt í at kunna og vilja byggja land og tjóð á veg fram móti sjálvbjargni, javnrættindum og frælsi - eitt ynski sum langt flestu føroyingar innast inni eisini vilja - so nevnir Vágaportalurin ikki henda valmøguleika í teirra 'kanning'???



**Eyðgunn Samuelsen**
*býráðs- og løgtingskvinna*

## Vakin býráðslimur

Tað er ikki á hvørjum degi ein fær eina heila oddagrein sum aftursvar. Kann benda á, at mín kritikkur av serblaðnum, ið Norðlýsð,i saman við Klaksvíkar kommunu sendi út í hvørt hús í landinum, ikki var heilt av leið.

Norðlýsið rør framundir, at eg skal verða tykkin, og at eg kanska hevði eina óhepna løtu, so var ikki. Tað, sum eg fyrst og fremst hevði at, var at Klaksvíkar kommuna fíggjaði eitt átak, sum vísti seg at verða samanvavt við partapolitikki. Eg kenni tað sum mína skyldu, sum býráðslimur, at vera á varðhaldi, tá ið tað snýr seg um, hvussu kommunan brúkar skattaborgarans pening, og hvussu kommunan umsitur, til frama fyri allar borgarar í kommununi.

### Klaksvíkar sjúkrahús

Tað er sjálvsagt, at Norðlýsið verjir teir stovnar, ið vit hava í Klaksvík. Men eg loyvi mær at pástanda, at sjálvt um eg valdi ikki at skriva í serblaðið, so merkir tað ikki, at eg ikki, eins og allir aðrir norðoyingar, vil varðveita Klaksvíkar Sjúkrahús. Eg mælti til, at býráðið í felag orðaði eitt skriv viðvíkjandi støðu býráðsins til hetta málið. Helt og haldi framvegis, at vit stóðu nógv sterkari á tann hátt, enn at vit, hvør í sínum lag, profileraðu okkum upp á at verja Klaksvíkar sjúkrahús. Tað var tilvitað, at eg valdi tað frá, at vera partur av hesi herferðini.

### Javnaðarflokkurin

Norðlýsið hevur fullan rætt til at viðgerða Javnaðarflokkin, tað tók eg eisini fram í míni grein. Tað sum eg átalaði var, at hetta óbeinleiðis var fíggjað av Klaksvíkar kommunu. At kommunan brúkar pengar uttan at vita, hvat ið hon betalir fyri, tað taki eg ikki undir við.

Viðvíkjandi innihaldinum í oddagreinini um Javnaðaflokkin, so var niðurstøðan, at flokkurin ikki arbeiðir fyri javnstøðu millum menniskju og økir í landinum. Tí er tað púra rætt, sum Norðlýsið skrivar, at tað ikki er relevant, at nevna øll tey dømini, ið eru beinleiðis prógv um, at niðurstøðan í greinini ikki er røtt. At eg og Norðlýsið ikki eru samd viðv. Javnaðarflokkinum er onki forgjørt í, men Norðlýsið má rokna við, at eg geri vart við tað, sum eg eri ósamd í.

### Branda Klaksvík

Eg haldi framvegis ikki, at hetta var rætti mátin, ið Klaksvíkar býráð valdi at branda býin. Tað var óumhugsað og illa fyrireikað. Klaksvíkin er á tremur av tænastum og tilboðum, ið vit kunnu bjóða fram. Orsaka av, at átakið ikki var fyrireikað, so kom bert ein lítil partur við, og tað er ikki gott nokk. Ein so stór kommuna eigur at kunna gera tað betur. Klaksvíkin sum lokalsamfelag hevur allar fortreitir fyri at verða kent sum eitt spennandi samfelag, har ið tú fær hug at vitja ella búseta teg. Ein fortreyt er, at vit branda okkum samsvarandi hesum, tað haldi eg ikki vit gjørdu nóg gott hesuferð.